Føroyingar í bumbuspreinging

Fimm føroyingar, sum vóru staddir í Katmandu í Nepal, vóru bara 30 metrar frá staðnum, har ein bumba brast sunnukvøldið. Eingin teirra fekk skaða

SPREINGING
Edvard Joensen

Fimm føroyingar vóru sunnukvøldið bara 30 metrar frá eini bumbuspreinging í Nepalska høvuðsstaðnum Katmandu. Eingin teirra fekk tó skaða.

Torgunn Kragesteen úr Havn, sum býr í Katmandu, sigur við Sosialin, at tey fimm fólkini vóru júst farin úr bilinum, tá bumban brast hinumegin ein múr.

Hóast spreingingin bert var 30 metrar frá teimum, var hon ikki so ógvuslig, at tað gjørdi teimum nakað. Múrurin tók eisini so mikið, at tað ikki bilti fólkunum nakað.

– Vit runnu burtur frá staðnum, greiðir Torgunn Kragesteen frá. Men nepalesar eru forvitin fólk, so tey runnu øvugtan veg fyri at frætta, hvat hent var.

Tá tey tveir tímar seinni komu aftur á staðið, greiðir Torgunn Kragesteen frá, frættu tey, at talan var um ein handil, sum sprongdur var í luftina.

Eisini frættu tey, at samstundis vóru eisini tvær aðrar bumbur sprongdar aðrastaðni í býnum. Tilsamans sjey fólk høvdu fingið skaða, og bæði bilar og motorsúklur vóru oyðiløgd.

Mánadagin var sonevnt maoistverkfall í Katmandu, sigur Torgunn Kragesteen. Tað vil siga, at bilar sleppa ikki at koyra.

Føroysku gestirnir í Katmandu fingu ongan skaða av bumbuspreingini, sum var at kalla undir liðini á teimum

Tó er hennara familja so mikið væl fyri at tey hava diplomatbil við bláum plátum, so hon fekk koyrt føroysku gestir sínar á flogvøllin, tí tey skuldu heimaftur til Føroya.

Torgunn Kragesteen letur annars væl at og letur heilsa, at hon hevur tað gott har eysturi í Himalaya.

†

Kunngjørt verður at okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

Emmily Nolsøe
Tórshavn,
fødd Rasmussen ættað úr Fuglafirði

andaðist 28. oktober 2002, 84 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin 1. november kl. 14.00.

Familjunnar vegna
Regin, Elsebeth og Heri

Tey, ið vilja minnast Emmily, kunnu geva Zarepta eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

†

Okkara kæra kona, mamma, omma, vermamma og systir

Anna Dalsgaard
f. Justinussen

andaðist sunnudagin 27. oktober, 64 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin kl. 14.00.

Familjunnar vegna
Jákup Dalsgaard

Tey, ið vilja minnast Onnu, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu.

Sámal Toftanes í Ribarhúsi

Leygardagin kl. 15 letur leirvíksmálarin, Sámal Toftanes, upp málningaframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði

LIST
Vilmund Jacobsen

Listamálarin, Sámal Toftanes í Leirvík, letur leygardagin, 2. november, upp málningaframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði. Við á framsýningini hevur hann umleið 25 málningar, sum hann serliga hevur málið seinastu tríggjar mánaðirnar.

Sámal er ein vælumtóktur, nattúralistiskur málari, og hetta sæst eisini aftur á málningunum, sum ímynda bygdaløg, landsløg og menniskju í ymiskum støðum. Onkur hendinga málningur fer kanska eitt sindur út í tað abstrakta.

Í sínum starvi sum listamálari, er 57 ára gamli leirvíkingurin nógv knýttur at árstíðini, og litríku málningarnir hesaferð ímynda í stóran mun heystið. Heildin er serstakliga vøkur, og ljósspælið - ella mótljósið, er ríkt og fjøllbroytt.

Sámal Toftanes við einum av sínum frálíku málningum. Aftanfyri sæst Sigatindur.
Mynd: Vilmund Jacobsen

Tónleikur og hugleiðingar

Framsýningin letur upp leygardagin kl. 15, tá fernisering verður. Brøðurnir, Høgni og Bárður á Lakjuni, fara at undirhalda við tónleiki og Jóannes S. Hansen, sum eisini er listamálari og hevur verið ein góður stuðul hjá Sámali, fer at hugleiða.

Í 1989 var Sámal fyrstu ferð við á eini málningaframsýning. Hetta var árliga framsýningin hjá Lions Eysturoy, men síðan hevur hann eisini verið við hvørja ferð. Síðan 1997 hevur Sámal verið við á ólavsøkuframsýningini, og tvær ferðir hevur hann verið við á várframsýningum, umframt í Smiðjuni í Lítluvík. Í Føroyahúsinum í Keypmannahavn og í Hjørring á Jútlandi hevur hann eisini verið við sínum málningum.

Framsýningin í Ribarhúsi verður opin hvønn dag fram til 17. november kl. 18. Leygardagar og sunnudagar verður opið frá kl. 14-18, og vanligar gerandisdagar um somu tíð, sum handilin í húsunum er opin.

Sámal er ein nærlagdur og vælumtóktur málari, og málningarnir hjá honum eru nógv eftirspurdir.

Hesin verður ringur at taka

Leygarkvøldið stungu hvalbingar ein sperðil sum slær øll met og sum verður ringur at taka

METSPERÐIL
Áki Bertholdsen

Nú í flettingini hoyrist nógv um at summi kappast um at hava tann feitasta veðrin.

Men hesi seinastu árini hevur eisini ein ávís kapping tikið seg upp um at fáa tann longsta sperðilin.

Og nú flettingin er farin at halla, er aftur eitt nýtt føroyskt met sett í sperðlum.

Og tað verður eitt met, sum verður ringt at taka.

Tað var, tá ið hvalbingar flettu eina gamla ær leygarkvøldið, at teir settu sær fyri at royna at fáa sperðilin so langan sum gjørligt í eini roynd at sláa metið.

Og væl eydnaðist, tí tá ið sperðilin varð strektur út og máldur, var úrslitið heilar 6,02 metrar og tað er longsti sperðil nakar veit um at siga.

Tað var ein 11 ára gomul ær hjá Olvheðini Thomsen, sum skuldi hava reyðan kraga leygarkvøldið. Tað var ein "Prestfjalsærin", sum pápi hansara hevði fingið frá abbanum, Olufi Thomsen, og sum Olvheðin síðani aftur fekk eftir pápan.

Tað vóru teir báðir Thorstein Thomsen og 10 ára gamli Jón Heini Guðmundsson, sum fóru undir at fletta hana.

Sjálvur hevur Thorstein fleiri ferðir roynt at seta nýtt met í sperðlum, men hvørja ferð var tað miseydnað. Hetta var so fjórða ferðin í ár at hann royndi og nú bar til.

Hann sigur, at teir høvdu eina termokannu við heitum vatni. Thorstein passaði sperðilin og Jón Heini passaði vatnið og syrgdi fyri, at tað altíð var heitt vatn í kokuni, so at tað alla tíðina rann eitt sindur av vatnið niður í sperðilin.

Tað gjørdi, at tað gekk bæði skjótt og væl at venda sperðlinum.

– Eg havi altíð hoyrt, at tað er gott at stinga eitt lungnapetti í sperðilin fyrst, tí tað skal reinsa væl og gera, at tað er lættari at stinga. Annars verður okkurt nýrapetti stungið í inn ímillum, tí tað smyr eisini og ger sperðilin lættari at stinga.

Sjálvur heldur Thorstein ikki at tað tók meiri enn einar fimm minuttir at venda sperðlinum og einar 10-15 minuttir at stinga hann.

Teir høvdu lunkað vatn á honum alla tíðina fyri at hann ikki skuldi stirðnað. Men sjálvur heldur Thorstein, at tað vóru lungnapettini, sum gjørdi munin.

– Hvørja ferð eg merkti, at tað hevði hug at standa fast, stakk eg eitt lungnapetti í og so gekk betri aftur

Vágasperðil

Annars er alt tað vanliga farið í sperðilin, lundini, tindin og kjøtpetti hiðani og haðani av krovinum.

Men teir stungu sperðilin eftir eini nýggjari uppskrift, sum teir hava fingið úr Vágum. Tað, sum varð stungið í sperðilin, varð væl kryddað við salti, pipari, knorri, salti og leyki.

Teir siga, at hetta er ein avbera góður máti, tí hesir sperðlarnir smakka avbera væl at feskir, antin at steikja, men helst at kóka.

Annars var ærin ikki so nógv at reypa av. Talan var um eina lambaær og hon vigaði 36 pund.

Gamla metið í sperðlum áttu suðuroyingar eisini, tað var av eini ær hjá Renhard Thomsen í Sandvík, sum varð flett í fjør, tann sperðilin var 5,87 metrar. Annars stungu Rólant Sørensen og Álvur Enni á Tvøroyri eisini ein sperðil í fyrrárið ið var 4,95- men nú er so tann fyrsti sperðilin komin upp um tað magiska markið upp á seks metrar.

Her eru teir báðir, Jòn Heini vinstrumegin og Torstein høgrumegin, við metsperðlinum upp á 6,02 metrar